# *Bygdaráðsfundur*

**<u>Bygdaráðsfundur 24.06.2013 *kl. 16.00 til kl. 19.30*</u>**

| | | |
|---|---|---|
| *Fundarstað:* | *Fundarhøli* | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

**<u>Mál nr. 91/2013 Byggimál</u>**

<u>J.nr. 2013-0042-0318</u>

**Málslýsing**

Í telduposti 20.05.2013 søkir Jákup A. Olsen um loyvi til at byggja ein hjall á matr. nr. 361, eystan fyri verandi sethús.

Hjallurin fer at standa oman og niðan, í plan við útistovuna, við hurð vestureftir. Hjallurin verður uml. 2x5m til støddar.

**Tilmælið**

Á fundi 05.06.2013 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi eftir innsendu tekning.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt

Jákup A. Olsen var úti, meðan málið varð viðgjørt

**<u>Mál nr. 92/2013 Byggimál</u>**

<u>J.nr.2013-0042-0319</u>

**Málslýsing**

Nes og Runavíkar kommunur hava í felag keypt húsini á Sandi Mikla, og eru kommunurnar samdar um, at ongin búseting skal verða har meira. Nes og Runavíkar kommunur hava samtykt, at húsini skulu burturbeinast.

Tekniska deild hevur biðið Sp/f JHR Entreprenørar, Runavík, og Falkon Entreprønerfelag Saltnes, um tilboð uppá at taka húsini niður.

Tilboðið frá JHR Entreprenørar er áljóðandi kr. 88.700,- u/mvg

Tilboðið frá Falkon Entreprønerfelag er áljóðandi kr. 85.000,- u/mvg

**Tilmælir**
Á fundi 05.06.2013 mælir Tekniska nevnd til at tikið verður av tilboðnum frá Falkon Entreprenørum uppá kr. 85.000,- u/mvg.

Á fundi 20.06.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

Av tí, at Nes- og Runavíkar kommunur gjalda hvør sína helvt, verður parturin hjá Nes kommunu kr. 42.500,-. Peningurin verður tikin av stovninum vatnveiting, konta vatnverkið nr. 1652.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 93/2013 Vegamál**
J.nr. 2011-0044-0048
**Málslýsing**
Ætlanin er at fáa asfalterað ein part av vegnum Undir Nesinum, tilsamans 1560 m². Nes kommuna kemur at gera fyrireikingararbeiðið, so sum at reinsa fram við garðar og kantar, saga har skeitir verða v.m.

Tekniska deild hevur biðið um tilboð uppá asfaltering frá HJ Asfalt og EM Asfalt.

Tilboðið frá HJ Asfalt er áljóðandi kr. 129,- pr. m² u/mvg
Tilboðið frá EM Asfalt er áljóðandi kr. 138,50 pr. m² u/mvg

**Tilmælir**
Á fundi 05.06.2013 mælir Tekniska nevnd til at tikið verður av tilboðnum frá HJ Asfalt uppá kr. 129,00 pr. fermetur u/mvg.

Á fundi 20.06.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum vegir, konta viðlíkahald bygdavegir nr. 1652.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Bygdaráðsfundur*

**<u>Mál nr. 94/2013 Brunamál</u>**
<u>J.nr. 2013-0043- 0001</u>
**Málslýsing**
Tá um- og útbyggingin av Tofta skúla var liðug í 2008, var ein nýggj sprinklaraskipan partur av um- og útbyggingini. Sprinklaraskipanin er partur av samlaðu tilbúgvingarskipani fyri Tofta skúla, men er hendan ongantíð góðkend. Ein tílík sprinkalarskipan skal góðkennast.

Góðkenningin verður gjørd av einum uttanveltaðum felag, og á Tofta skúla er tað danska felagið RMG-Inspektion, sum stendur fyri góðkenningini. Áðrenn RMG-Inspektion kann góðkenna sprinklaraskipanina skal fyriliggja ein samtykt frá bygdaráðnum.

**Tilmælið**
Á fundi 05.06.2013 mælir Tekniska nevnd til at góðkenna sprinklaraskipanina fyri Tofta skúla.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt

**<u>Mál nr. 95/2013 Byggimál</u>**
<u>J.nr. 2007-0042-0140</u>
**Málslýsing**
Í umsókn dagfest 26.05.2013 søkja Hallgerð Højgaard og Kristian Poulsen Toftir, um byggiloyvi samb. insendu tekning dagfest 22.04.2013.

Byggiloyvið er til sethús á grundstykki matr. nr. 699ø á Nesi.

**Tilmælið**
Á fundi 05.06.2013 mælir Tekniska nevnd til at játta Hallgerð Højgaard og Kristiani Poulsen byggiloyvi til sethús, á matr. nr. 699ø, eftir innsendu tekning dagfest 22.04.2013.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt

**<u>Mál nr. 96/2013 Havnamál</u>**
<u>J.nr. 2012-0046-0055</u>
**Málslýsing**
Bygdaráðið í Nes kommunu tók í febr. 2012 avgerð um at byggja eina atløgubryggju inni á Rætt. Avgerð bleiv tikin um at bjóða arbeiðið út millum Articon og J&K Petersen.

J&K Petersen hevði lægra tilboðið, og í juni 2012 varð avgerð tikin um at byggja eina 20 m atløgusíðu. Sáttmálaprísurin var kr. 1.972.509. Afaltering, mastrarfundament, el- og vatnleiðingar, projektering og bygglileiðsla er ikki íroknað.

Síðani núverandi bygdaráð tók við á nýggjárinum, hevur nógv verið tosað um, um ein atløgubryggja uppá 20 m var nóg long og nóg trygg til tað virksemið, sum eftir ætlan skal verða inni á Rætt.

Tilboð er komið frá J&K Petersen uppá leingjan av atløgusíðuni uppá 20m. Tilboðið er uppá kr. 1.907.500.

Umframt tilboðini frá J&K Petersen kemur kostnaður afturat uppá projektering, eftirlit, asfaltering, mastrarfundament, el- og vatninnleggingar v.m.

Samlaði kostnaðurin er mettur til kr. 4.546.264.

Kr. 1.174.354 blivu útreiðsluførdar í 2012. Í mun til metingina, verður restupphæddin kr. 3.371.910, at útreiðsluføra í 2013. Restupphæddin verður fíggjað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Kr. 2.500.000 | við lántøku |
| Kr. 871.910 | av tøkum peningi |

Roknað verður við at kommunan tekur sær av at leggja vatn og el-leiðingar, og er tað ikki roknað við í omanfyristandandi uppgerð. Heldur ikki er roknað við óvæntaðum útreiðslum.

**Tilmælir**
Á fundi 05.06.2013 mælir Tekniska nevnd til at leingja atløgusíðuna við 20 m, so samlaða longdin á atløgusíðuni verður 40 m.

Á fundi 20.06.2013 tekur fíggjarnevndin undir við teknisku nevnd og mælir til at taka av tilboðnum frá J&K Petersen frá 06.06.2013 uppá kr. 1.907.500.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 97/2013 Byggimál**

J.nr. 2007-0042-0019

**Málslýsing**

Festarin, Katrin Poulsen, sum hevur eina avtalu við Nes kommunu frá 2008 um bygging av seyðhús norðan fyri ítróttarøkið á Svangaskarði, hevur ynskir um at fáa seyðhúsið bygt á øðrum stað.

Festarin ynskir at fáa loyvi til at byggja seyðhús eystan fyri Høganes, við endan á vegnum. Økið er lætt at planera og lætt at grava út til eitt seyðhús á umleið 15x6 m.

**Tilmælið**
Á fundi 19.06.2013 mælir tekniska nevnd til at játta festaranum prinsipielt byggiloyvi eystan fyri Høganes, við endan á vegnum í førir eystur um Høganes, við hesum treytum:

- at byggingin verður góðkend av avvarandi mynduleikum (Friðingarmynduleikunum, Búnaðarstovuni og Nes kommunu)
- at alt frárensl frá seyðhúsinum verður leitt í kloakk ella eftir nærri ásetingum frá Teknisku deild, vísandi til umhvørvislógina, og at festarin ber kostnaðin av hesum .
- at um Nes kommuna hevur brúk fyri økinum, har seyðhúsið stendur, verður seyðhúsið at taka niður og flyta á annað stað uttan eykakostnað fyri Nes kommunu.

Niclas Davidsen var ikki við í viðgerðini av hesum málinum. Jákup A. Olsen varð innkallaður fyri Niclas.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt

**<u>Mál nr. 98/2013 Havnamál</u>**
<u>J.nr. 2012-0003-0019</u>
**Málslýsing**
Í sambandi við lýsing eftir havnameistara í farloyvisstarv, til Tofta Havn, var 1 umsókn innkomin tá umsóknarfreistin var úti 17.06.2013 kl. 12.00.

Tekniska nevnd var setanarnevnd.

Niclas Davidsen var ikki við í viðgerðini av hesum málinum. Jákup A. Olsen varð innkallaður fyri Niclas.

**Tilmælið**
Setanarnevndin mælir til, at Theodor Poulsen verður settur í farloyvisstavið fyri havnameistaran í eitt ár.

**Avgerð**
Tilmælið frá setarnarnevndini var eimælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt

**Mál nr. 99/2013 Byggimál**
J.nr. 2013-0042-0321
**Málslýsing**
Í telduposti 18.06.2013 søkir SEV um byggiloyvi til at víðka um verandi transformaturstøð nr. 182, við einum tilbygningi til goymslurúm, sambært innsendu tekningum.

**Tilmælið**
Á fundi 19.06.2013 mælir Tekniska nevnd til at játta SEV byggiloyvi, við hesum treytum:

- at bygt verður sambært innsendu tekning
- at væl verður gingið um, so einki órudd rekst í haganum
- at byggireglugerðin hjá Nes kommunu verður fylgd
- at Tekniska deild verður boðsend áðrenn bygt verður
- at Nes Hagi góðkennir byggingina

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 100/2013 Mentamál**
J.nr. 2013-0011-0036
**Málslýsing**
Hin 14.05.2013 er fíggjarætlanin fyri 2014, hjá Bókasavninum í Nes kommunu komin til ummælis.

Høvuðstølini eru hesi:

| | **2014** | **2013** |
|---|---:|---:|
| Lønir | 61.000,- | 61.000,- |
| Húsaútreiðslur | 4.500,- | 4.500,- |
| Fólkabókasavn | 51.000,- | 51.000,- |
| Skúlabókasavn | 40.000,- | 40.000,- |
| Aðrar útreiðslur | 44.500,- | 44.500,- |
| Útreiðslur í alt | **201.000,-** | **201.000,-** |

Inntøkur:

| | | |
|---|---:|---:|
| Skúlabókastudningur | 40.000,- | 40.000,- |
| Kommunustudningur | 100.000,- | 100.000,- |
| Hølisvirði | 4.500,- | 4.500,- |
| Landskassastuðul | 56.000,- | 56.000,- |
| Inntøkur í alt | **201.000,-** | **201.000,-** |

**Tilmælir**
Á fundi 04.06.2013 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini hjá Bókasavninum soleiðis, sum hon er uppsett.

Á fundi 20.06. 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 101/2013 Mentamál**
J.nr. 2013-0019-0043
**Málslýsing**
Í telduposti frá FO Music Management 31.05.2013 verður spurt, um áhugi er fyri at stuðla Halli Joensen við keyp av fløguni.

Hallur Joensen hevur verið í Nashvill og innspælt eina nýggja fløgu, sum kemur á marknaðin 03. juni 2013.

**Tilmælir**
Á fundi 04.06.2013 mælir Mentanevndin frá at fløgur verða keyptar.

Á fundi 20.06. 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 102/2013 Mentamál**
J.nr. 2013-0024-0016
**Málslýsing**
KFUM- skótarnir við Løkin høvdu 30 ára stovningadag 9. juni, og varð nýggja skótahúsið tikið alment í nýtslu.

Í Nes kommunu eru nógv ung og børn, sum eru KFUM skótar og hava verið tað í nógv ár.

**Tilmælir**
Á fundi 04.06.2013 samtykti Mentarnarnevndin at geva KFUM-skótunum ein gávukekk á kr. 3.000,- í samb. við 30 ára stovningardagin, og at felagið tekur nýggja skótahúsið í nýtslu.

Á fundi 20.06.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við samtyktini hjá Mentanarnevndini og at peningurin verður tikin av stovnunum stuðul til mentan, konta annar stuðul 5490.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 103/2013 Mentamál**
J.nr. 2013-0022-0002
**Málslýsing**
Í skrivi móttikið 07.06.2013 søkir missiónshúsið Tabor á Toftum, um fíggjarligan stuðul.

Hetta er í sambandi við at missiónshúsið verður 20 ár komandi ár, og hevur ætlanir um at gera nýggjan pall og keypa nýtt annlegg.

**Tilmælir**
Á fundi 22.06.2013 mælir Mentanarnevndin til at játta kr. 5.000,-, sum stuðul til Missiónshúsið Tabor.

Á fundi 24.06. 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovnunum stuðul til mentan, konta annar stuðul 5490.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 104/2013 Mentamál**
J.nr. 2013-0021-0070
**Málslýsing**

Í samband við lýsing eftir vaskifólki til Tofta skúla, vóru 8 umsóknir innkomnar tá umsóknarfreistin var úti 19.06.2013.

Mentanarnevndin var setanarnevnd.

**Tilmælið**
Á fundi 22.06.2013 mælir setanarnevndin til, at Birgit Gleðiheygg verður sett í starv, sum vaskifólk við Tofta skúla eftir summarfrítíðina 2013.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt

**Mál nr. 105/2013 Trivnaðarmál**
J.nr. 2012-0019-0034
**Málslýsing**
Í umsókn dagfest 30.04.2013 søkir Kvinnuhúsfelagið og Kreppumiðstøðin um fíggjarligan stuðul til virksemið hjá teimum fyri 2013.

**Tilmælir**
Á fundi 13.06.2013 mælir Trivnaðarnevndin til, at Nes kommuna stuðlar Kvinnuhúsfelagnum og Kreppumiðstøðini við somu upphædd sum í 2012, kr. 1.200,00.

Á fundi 20.06. 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til endamál innan Almanna og Heilsumál, konta 5490.

**Avgerð**
Tilmælið frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndin vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 107/2013 Fyrisitingarmál**
J.nr. 2013-0004-0019
**Málslýsing**
Borgarstjórastarvið hevur í 10 ár verið fulltíðarstarv. Á bygdaráðsfundinum 14. november 2012 skipaði nývalda bygdaráðið seg við Jóhannus Danielsen sum borgarstjóra. Nývaldi borgarstjórin var um tað mundi nevndarlimur í ymiskum partafeløgum, og sambært kommunustýrislógini kann borgarstjórin ikki verða í fulltíðarstarvi, og samstundis hava onnur størv. Borgarstjórin hevði tí ynski um, at borgarstjórastarvið var normerað til hálva tíð, so leingi hann var nevndarlimur í teimum ymisku partafeløgunum, og tað var einmælt samtykt.

Nú borgarstjórin ikki er nevndarlimur í nøkrum partafelag meira, og tí hevur møguleika fyri at røkja borgarastjórastarvið fulla tíð, skal bygdaráðið taka støðu til, um borgarastjórastarvið aftur skal verða fulltíðarstarv, soleiðis sum tað hevur verið í 10 ár.

**Tilmælið**
Á fundi 20.06.2013 mælir Fíggjarnevndin til, at borgarstjórarstarvi aftur verður fulltíðarstarv frá 01.07.2013. Hetta viðførir ikki nakra broyting í fíggjarætlanini fyri 2013.

Jóhannus Danielsen borgarstjóri var úti, meðan málið varð viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð eimælt samtykt.

Jóhannus Danielsen borgarstjóri var úti, meðan málið varð viðgjørt

**Mál nr. 108/2013 Fyrisitingarmál**
J.nr. 2012-0049-0010
**Málslýsing**
Vanligt hevur verið hesi seinastu árini, at Tekniska nevnd hevur fingið heimild til at avgreiða átrokandi byggimál og onnur teknisk mál í summarfrítíðini.

**Tilmælið**
Bygdaráðið skal taka støðu til, um henda skipanin skal vera galdandi,
eisini í summar, og geva Teknisku nevnd heimild til at avgreiða málini, sum vera aktuel í summarfrítíðini.

**Avgerð**
Á bygdaráðsfundi 24.06.2013 samtykti bygdaráðið einmælt at geva Teknisku nevnd heimild at avgreiða mál, sum vera aktuel, í summarfrítíðini 2013.

**Mál nr. 109/2013 Fíggjarmál**
J.nr. 2013-0011-0028
**Málslýsing**
Roknskapurin fyri 2012 hjá Kongshavnar havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

| | **Ætlan 2012** | **2012** | **2011** |
|---|---|---|---|
| Havnagjøld | 674.000 | 789.917 | 419.394 |
| **Inntøkur brutto** | **674.000** | **789.917** | **419.394** |
| Uppkrevjingarkostnaður | -168.500 | -197.479 | -104.849 |
| **Inntøkur netto** | **505.500** | **592.438** | **314.545** |
| Fyrisitingin | -143.000 | -71.537 | -70.549 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | -1.500 | -1.393 | -1.500 |
| Marknaðarføring | -75.000 | -75.000 | -75.000 |
| Umhvørvi | -10.000 | 0 | 0 |
| Rudding | -70.000 | 0 | 0 |
| Úrslitáðrenn rentur | **206.000** | **444.508** | **97.497** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur og tílíkt | 15.000 | 3.901 | 5.294 |
| **Ársins úrslit** | **221.000** | **448.409** | **102.790** |

**Tilmælið**
Á fundi 20.06.2013mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum fyri 2012, soleiðis sum hann er uppsettur.

Súni í Hjøllum var úti meðan málið varð viðgjørt

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var eimælt samtykt.

Súni í Hjøllum var úti meðan málið varð viðgjørt.

**Mál nr. 110/2013 Fíggjarmál**
J.nr. 2012-0011-0033
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av eykajáttanini til fíggjarætlanina fyri 2013, varð samtykt á bygdaráðsfundinum 13.05.2013. Eykajáttanin til fíggjarætlanina fyri 2013 skal hava tvær viðgerðir, og er hetta onnur viðgerð av eykajáttanini.

| | |
|---|---|
| **§1 Kommunal fyrisiting (meirjáttan í alt)** | **66.000** |
| **§2 Almanna- og heilsumál (meirjáttan í alt)** | **15.000** |
| **§3 Børn og ung (meirjáttan í alt)** | **20.000** |
| **§5 Mentan rakstur í alt (minnijáttan í alt)** | **-291.400** |
| **§5 Mentan íløgur í alt (meirjáttan í alt)** | **2.550.000** |
| **§6 Teknisk mál í alt (meirjáttan í alt)** | **200.000** |
| **§7 rakstur í alt (minnijáttan í alt)** | **-95.000** |
| **§7 íløga í alt (meirjáttan í alt)** | **3.550.000** |
| **í alt rakstur (minnijáttan í alt)** | **-85.400** |
| **Í alt íløgur (meirjáttan í alt)** | **6.100.000** |
| **§20 í alt (meirjáttan)** | **85.000** |
| **Endaligar reguleringar** | **6.099.600** |

| | |
|---|---|
| **lántøka í alt** | **5.040.000** |
| **Tøkur peningur** | **1.059.600** |
| **Í alt** | **6.099.600** |

**Tilmælið**
Á Fíggjarnevndarfundi 20.06.2013 var onnur viðgerð av eykajáttanini til fíggjarætlanini fyri 2013 og mælir Fíggjarnevndin til at hækka eykajáttinina, til íløguna á havnini, við kr. 1.550.000, frá kr. 2.000.000 mió kr. til 3.550.000.

Hækkanin verður partvís fíggjað við lántøku og tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt